Viðmerking:

Volapykk ella hugsjónir

Ikki óvæntað, so herja í løtuni pástandirnir um, at Tjóðveldisflokkurin hevur lagt seg á høgraveingin í føroyskum politikki. Pástandir um, at hugsjónarliga eru vit á veg móti einum minni samhaldsføstum samfelag, har tann veiki verður sleptur uppá fjall. Orsøkin er, at tað hevur eydnast at semjast um í samgonguni, at fiskivinnan skal ikki hava studning. Ístaðin skal vinnan hava greiðar politiskar karmar til at endurnýggja seg sjálva. Tað er sjálvsagt heilt natúrligt, at hinir størru flokkarnir royna at gykla fólki fyri, at hetta er neoliberalistiskt, og at hetta fer at savna fiskivinnuna á fáar hendur. Hetta eru jú útleggingar, sum passa væl til partapolitiskan vinning hjá júst hesum flokkum. Og uttan mun til, hvat varð gjørt, høvdu hesir flokkar helst sagt júst tað sama.

Men hetta er tíbetur politiskt volapykk. Øll munnu vita, at tað er beint øvugt. Eitt tógvið politiskt stríð er vunnið um ikki at brúka almennar pengar til nakrar fáar einstaklingar. Vit skulu ikki brúka almennar pengar til at oyðileggja vinnulívið og til at oyða okkara náttúrutilfeingi. Vinnan skal kasta av sær til pensiónir, barnagarðar, sjúkrahús, skúlar, vegir og alt annað, sum øllum skal tryggjast í einum føroyskum vælferðarsamfelag.

Studningur er ikki samhaldsfastur

Tað minst samhaldsfasta vit kunnu gera, er at halda fram við vinnupolitikkinum frá 70'unum og 80'unum. Tað gav nøkrum fáum einstaklingum pengar í lumman, meðan allir aðrir føroyingar fingu rokningina. Ein rokning uppá helst einar 13 milliardir krónur, sum vit øll gjalda fyri enn og í framtíðini. Studningur hevur altíð elvt til, at bert tann sterkasti vinnur, og vit hava fingið sjón fyri søgn um, at í studningspolitikkinum er eins deyð annans breyð.

Tí hevði verið áhugavert at hoyrt nakað um, hvørjar hugsjónir eitt nú javnaðar- og sambandsflokkurin hava um føroyskan vinnupolitikk og hvussu teir ætla at tryggja eitt samhaldsfast samfelag.

Skipaði viðurskifti


Rópt verður nú um "íslendskar tilstandir við kvotubarónum" og um frían fiskiskap. Hetta hevur onki hald í veruleikanum:

- Økisfriðingarnar verða fasthildnar
- Eitt skott skal setast millum tann stóra flotan og útroðrarflotan.
- At fiskidagar gerast umsetiligir fyri tann stóra partin av heimaflotanum merkir ikki, at vit kunnu hava kvotubarónar, sum bara liva av at keypa og selja kvotur. Her skal gerast ein skipan við einum "kvotubanka" ella "fiskidagabanka", soleiðis at fiskidagar verða umsettir eftir skipaðum og gjøgnumskygdum viðurskiftum.
- Tilfeingið er ogn Føroya fólks, og um tann, sum hevur veiðiloyvi og fiskidagar ikki brúkar henda møguleikan, so missir hann veiðirættin, sum fellur aftur til tað almenna og kann bjóðast onkrum øðrum.
- Harafturat kunnu vit at forða fyri, at fiskidagar savnast á fáar hendur við at gera eina lóggávu móti miðsavning av fiskidøgum og øðrum rætti til vinnuvirksemi.

Sostatt fáa vit skipaði viðurskifti fyri vinnuna. Vit tryggja alment gjøgnumskygni. Og vit tryggja, at vinnan skal kasta av sær til samfelagið og okkum øll.

Grundarlagið fyri vælferð

Hetta er kjarnin fyri eitt samhaldsfast og trygt føroyskt samfelag: At tey, sum



fáa loyvi at troyta okkara felags tilfeingi skulu kasta av sær til samfelagið og fylgja nøkrum almennum reglum. Hetta fer at geva okkum eina vinnu, sum sjálv kann endurnýggja seg og uppfylla krøvini um góða løn/hýru, gott arbeiðsumhvørvi og trivnað fyri tey, sum starvast har. Hetta fer at geva okkum eina vinnu, sum fylgir umhvørviskrøvum og fær mest burturúr tilfeinginum, og sum kastar av sær til tað almenna. Og hetta fer at geva okkum grundarlagið fyri einum føroyskum vælferðarsamfelag.

Tað er ein verulig hugsjón og politikkur í verki. Og ikki politiskt volapykk.

Høgni Hoydal
landsstýrismaður

Hugleiðingar um fullveldi


Herfyri hoyrdu vit gløgga havfrøðingin Boga Hansen greiða okkum frá, at havið kring Føroyar gerst kaldari, og at vit helst fáa eina lítla ístíð um eini 100 ár ella so. Fiskurin rýmir. Kanska onkur uvakkur og ulka verða eftir. Og Oljan er tá fyri langt síðani uppi. Ikki nógv hjá okkara eftirkomarum at liva av! Hvør skal tá betala frálíku umsitingina, sum vit við bit og slit hava fingið á føtur?

Við slíkum framtíðarvánum tosa vit í fullum álvara um fullveldi. Hvaðani skulu bispur og prestarnir fáa sína løn? Helst flyta teir allir av landinum og føroyingar gerast svartastu heidningar. Glæsiliga nýggja løgtingshúsið stendur og fellur í órøkt, tí at vit hava ikki ráð at halda tað viðlíka. Og hvørjum skulu okkara dugnaligu politikarar liva av? Av at bíta negl kanska? Nei, lat okkum koma okkum burturúr fullveldisrúsinum og ikki koma okkum út í djúpasta óføri. Danir hava nú klætt og føtt okkum í øldir og hví ikki tað? Tað hevur jú riggað væl og teir vilja jú sjálvir so gjarna. Hvat skulu vit bróka fullveldi til? Kann tað kanska etast? Sum ein danskur ministari á vitjan so klókt segði tað í útvarpinum: »Fullveldi, tað sigur ikki mær nakað«.

Danski statsministarin segði í somu sending, at vit skuldu bert siga frá, hvat, ið vit vóru ónøgdir við, so skuldi hann nokk laga viðurskiftini eftir okkara ynski. Ja, sjálvt um tað vóru fleiri pengar úr Danmark vit vildu hava, so var tað ikki óhugsandi. Og at spæla við skuldu vit sleppa so galið vit vildu. Tað skuldi nú bara mangla. Grønland fær heilar 3, meðan vit bert fáa 1 miljard um árið. Vit mugu vera eitt ótakksamt og stórsnútað fólk, um vit ikki vilja taka av einum slíkum stórsinnaðum tilboði.

Øllum hesum vilja vit sleppa fyri eitt innantømt fullveldi. Tað endar sum í Íslandi. Okkara børn fara ikki at suga danskt. Og hvussu skulu tey tá koma sær fram í verðini? Og hvat við okkara listamonnum, sum eru á donsku finanslógini? Skulu teir bara sleppast upp á fjall fyri lút og kalt vatn? Og hvaðani skulu vit fáa medaljur frá, tá vit ikki longur hava kongshúsið? Frá viðoyinginum Anfinni Kallsberg kanska? Nei takk!

Góðu landsmenn, sleppið hasum fullveldismøsninum. Tá nú ístíðin kemur, verður tað gott at fáa eina vermandi



hond úr Danmark. Eru vit so fullir av undirlutakenslum mótvegis dønum, at vit vilja nokta at taka ímóti eini heilari miljard um árið frá teimum fyri einki? Frá bróðurfólkinum, sum hevur verið okkum so hollur stuðul. Sum hevur hjálpt okkum at fáa umstøður at kunna loysa okkum buksirnar í Sandagerði, okkara næst mest halgað stað, á sømuligan hátt. Verri er statt í Kirkjubø, okkara mest halgað stað, har mugu vit enn sum fyrr fara inn í halgidómin at pissa. Men ikki ivist eg í, at danir eisini her høvdu viljað hjálp okkum við einum nátthúsi, um vit sendi eina umbøn.

Áðrenn vit høvdu lært okkum at skriva vóru danskir embætismenn so beinasamir at skriva bønarbrøvini um veitingar fyri okkum. Frá »de fattige Folk udi Færø«. So hetta at fáa veitingar úr Danmark er ikki nakað nýtt, men ein hevdvunnin rættur. Kann tað vera nøkur skomm at halda fast um rættindi sum okkara forfedrar við mikið knoss og strev hava vunnið okkum?

Sjálvt um vit hava verið danir nú í brátt tveyhundrað ár, hevur eingin so frægt sum kannað eftir, hvørjar møguleikar vit hava sum danskarar. Nú ein dagin datt endiliga fimmoyrað hjá samfelagsfrøðinginum Jógvan Mørkøre og mælir hann til, at ein slík kanning verður gjørd og tað ongantíð ov skjótt. Gott at tað glógvar í onkrum! Lat okkum fáa gjørt eina kanning, sum greitt vísir, hvussu gott vit hava tað saman við Danmark og lat okkum so sleppa øllum fullveldisørskapinum. Tí øll vita vit innast inni at ikki formáa vit okkum nógv uttan stuðul bæði so og so úr Danmark.

A. Guttormur Djurhuus

Minningarorð ognað

Eyðun Strøm
f. 21. apríl 1981 - d. 18. sept. 1999

Álvur Mortensen
f. 8. mai 1980 - d. 18. sept. 1999

Hávardur F. Lisberg
f. 27. mai 1980 - d. 20. sept. 1999

Seinur verður tann dagur,
at vit gloyma tey tungu boð.
Tey boð, vit fingu leygardagin,
at Eyðun og Álvur vóru farnir umborð.

Umborð á stóra skipið,
ið siglir úr hesi verð.
Yvir salta havið, upp um skýggja,
til eina betri verð.

Hávardur tann triðji
fór eisini umborð,
umborð á stóra skipið,
og burt úr hesi verð.

Nú sita vit øll eftir
við hesi stóru sorg,
má Harrin okkum styrkja
og turka tár so mong.

Ei fall tað okkum so í lut
at vita tíð og stað,
nær Harrin okkum taka man
og fara við oss avstað.

Tó, eitt smíl kemur gjøgnum tárini, tá eg hugsi um teir dagar, vit høvdu saman. Allar tær løtur vit hava diskutera, og allar tær skemtiligu stundir. Alt kemur so smátt fram aftur nú.

Foreldur, systkin, ommur og abbar og annars øll tit avvarðandi, eg sendi tykkum mína djúpastu samkenslu.

Eyðun, Álvur og Hávardur, takk fyri, at tit vóru teir, tit vóru.

Vinkona tykkara Linda

Útjaðara-samgongan

Tað er alt annað enn hugaligt at hoyra um, at tingmenn sum rokna seg at hoyra til útjaðararnar í Føroyum, hava tikið seg saman um at broyta støðuna sum smáplássini eru komin í. Fyrst er at spyrja, hvørjar eru útjaðarabygdirnar? Eru tað so stór pláss sum Tvøroyri og Klaksvík, kunnu hesi býir samanberast við Skarvanes ella á Kirkju? Ein broyting ið gerast skal, er, at nakað av umsitingini, ið er í høvuðsstaðnum, skal flytast til onkra aðra bygd úti um landi, so er spurningurin hvørja? Hvat bati verður tað fyri Klaksvík um ein partur av Gjaldstovuni fer suður til Vágs. Ella fyri Sandsbygd um nakað av Almannastovuni fer vestur í Vágar. Jú, onkur klókur skalli, hevur funnið útav, at fyri at tólma fólkaflytingini av teim smáu plássunum til høvuðsstaðin, er frægasta loysnin at gera høvuðsstaðin tannleysan, so fólk heldur fara at ræðast hann.

Sum ikki einaferð, eru vit fleiri, ið taka partí við ella ímóti hesari ætlan. Ja, onkur gongur ógvuliga høgt uppí, hendan spurning, so høgt at fullveldismálið er við at fara í gloymskuna. Um so hevði verið, so eru vit fleiri mótstøðufólk av fullveldinum sum heldur hava hug at hella útjaðaravegin.

Palli Dalsgaard

Lesið eisini Sosialin á Internetinum
www.sosialurin.fo